# Spakførur úrmælingur sigur søgur við strikum

**Bárður Oskarsson hevur við sínari eyðkendu striku og stuttligu søgum flutt mørk innan føroyskar barnabókmentir, men honum dámar ikki at gera nógv burtur úr sær sjálvum. – Eg arbeiði bara, sigur hann**

## Samrøða



**Dorit Hansen**
dorit@sosialurin.fo

Hann var einans 14 ár, tá hann fyrstu ferð myndprýddi ein føroyska barnabók. Hetta var eitt jólablað, og síðani hevur Bárður Oskarsson arbeitt saman við Bókadeild Føroya Lærarafelags um fleiri barnabøkur.

– Flestu børn gevast at tekna, tá tey eru um sjey -átta ár, men eg gavst ongantíð. Eg vaks upp í einum umhvørvi, har tað at tekna var náttúrligt og vanligt, og mær dámdi væl at orða meg við myndum, sigur Bárður, sum hevur búð í Keypmannahavn alt sítt vaksna lív. Tekningin er ikki longur eitt ítrív, men ein lívsstarv.

Bæði pápin, Herman Oskarsson, og abbin, Oskar Hermansson, teknaðu. Abbin hevði onkra framsýning, og pápin teknaði til samfelagssatiriska Ruskovnin. Men Bárður heldur ikki, at tekningin bara er sosialur arvur. Tað hevur eisini ligið í fingrunum og í persónliga áhuganum, heldur hann.

Bárður arbeiðir hálva tíð á frítíðarsskúla. Málið er at kunna liva av listini, og kanska er ikki so langt á mál. Í øllum førum hevur hann sligið navn sítt fast við trimum barnabókum, sum hann bæði hevur skrivað og myndprýtt. Tann fyrsta av teimum, »Ein hundur, ein ketta og ein mús«, er umsett til fleiri mál. Og tann seinasta, »Beinið«, skuldi – sum Bárður sigur – ikki verið so torfør at umsett. Hon hevur eingin orð.

### Teknar áðrenn hann skrivar

Fyrst í 90unum tók Bárður Oskarson ein stegð frá tekningunum og halgaði seg málningalistina. Men í 1998 vendi hann aftur til bókavinnuna, tá hann myndprýddi bókina, »Margreta og Mjólkin«, hjá Siggu Vang.

– Mær dámar bæði at tekna og mála, og í dag geri eg bæði, sigur Bárður. Tað er ikki tann stórur munurin, heldur hann. Men tað er sjálvandi meira bundið, tá hann teknar til bøkur hjá øðrum, og tá hann málar hugsar hann ikki í søgum.

– Men í síðsta enda eru bæði eitt arbeiði. Og tá eg tekni og máli, so arbeiði eg bara, sigur Bárður lítillátin.

– Eg eri praktiskt anlagdur og hugsi ikki so háfloygt. Eg arbeiði bara, og havi gjørt tað so leingi, at eg dugi mítt arbeiði. Tí fungerar tað, og í dag lukkast tað oftari enn tað miseydnast, sigur hann og flennir.

Tríggjar barnabøkur eru útkomnar, har Bárður hevur gjørt bæði orð og myndir. Hesar eru »Ein hundur, ein ketta og ein mús«, »Pól, hin kuli giraffurin« og »Beinið«. - Eg tekni søgurnar fram, og tað er eingin søga, fyrr enn eg eri komin í helvt. Nógvar myndir verða frávaldar, og so byrjar søgan at fortelja seg sjálva, greiðir hann frá.

– Eg skrivi eisini søguna so seint sum gjørligt fyri at halda lív í tekningunum.

### Partur av evropeiskari teknilist

Bárður Oskarsson hevur eina serliga striku, og tekningar hansara minna meira um altjóða rák innan tekniseriur enn nakra føroyska



***– Teknaðar søgur skulu ikki vera ov fløktar, men tær skulu heldur ikki vera ov einfaldar. Tær skulu fanga og vera stuttligar, sigur Bárður Oskarsson. Onkuntíð koma søgurnar skjótt hjá honum, men við hvørt tekur tað langa tíð. Í fleiri ár royndi hann at fáa eina søgu uttan tekst at fungera, og við søguni, »Beinið« eydnaðist tað, sigur hann.***

siðvenju. Sjálvur sigur Bárður, at hann hevur teknað í so nógv ár, at hann hevur funnið sína egnu striku.

– Eg havi ikki nakrar ávísar fyrimyndir innan barnabøkur, men kanska havi eg fingið íblástur frá nýggjari europeiskum tekniserium.







*Bæði heiti og søgur eru einføld, men »Pól, hin kuli giraffurin«, »Beinið« og »Ein hundur, ein ketta og ein mús« eru samstundis fullar av dýpd og humori*